# Jól í Avstralia 1

Í londunum, sum eru limir av bretska Commonwealth-samtakinum, og sum liggja á Sunnaru Hálvkúglu, verða Jólini hildin hin 25. desember. Á Sunnaru Hálvkúglu merkir tað, at Jólina falla í heitastu summartíðini. Jólasiðirnir í Avstralia minna fyri ein stóran part um jólasiðirnar í Vesturheiminum. Eingin kavi er í námind, men nógvur tilgjørdur kavi verður nýttur til at prýða handlar og handilsmiðdeplar. Á nógvum støðum er Jólamaðurin í einum reyðum skinnpelsi, á einari hvítari sletu, sum akar á tilgjørdum kava. Sangir sum “Jingle Bells” tóna út gjøgnum hátalarnar. Fólk senda jólakort, og nógv jólaprýði er at síggja í øllum tí avstralska summarhitanum. Av tí, at Jólini falla á hásummarið, so eru sjónvarpsskráirnar ikki so nógv merktar av Jòlunum, sum sjónvarpsstøðirnar á Norðaru Hálvkúglu. Serliga í gamla móðirlandinum Bretlandi, har Jólini eru millum teir dagarnar, har flest fólk hyggja eftir sjónvarpssendingum. Tað ironiska við Avstralia er, at tey dyrka sangin “White Christmas” hjá Bing Crosby!






















